Ár 2015, tann 14. apríl, varð ársaðalfundur hildin í P/f Norðoyatunnilin. Fundurin varð hildin á Hotel Hafnia. Ætlanin var, at fundurin skuldi byrja kl. 11.30, men varð útsettur til kl. 13.30 eftir avtalu við partaeigaran.

Fundarluttakarar:

Partaeigarin var umboðaður av Jørgen Niclasen, landsstýrismanni, Bjarna Askham Bjarnason og Atla Eirikson frá Fíggjarmálaráðnum. Øll nevndin var møtt burtursæð frá Hera Hammer, sum var sjúkur. Somuleiðis vóru stjórin Uni Danielsen, grannskoðararnir Jógvan Amonsson og Jan Arabo umframt Óla Jákup Kristoffersen, advokatur, eisini á fundi.

1. Nevndarformaðurin Jens Kári Vilhelm ynskti vælkomin og skeyt upp at velja Óla Jákup Kristoffersen sum fundarstjóra. Hann varð valdur. Fundarstjórin staðfesti, at fundurin lógliga var innkallaður, og lýsti soleiðis fundin sum lógliga settan.

2. Stjórin Uni Danielsen greiddi vegna nevndina frá virki felagsins í farna ári, herundir eisini kunning sambært § 18. Frágreiðingin varð givin við støði í Power Point, eins og skrivligari ársfrágreiðing, sum varð býtt út á fundinum. Fylgjandi kom m.a. fram í frágreiðingini:

   Høvuðstølini fyri rakstrinum 2014 vórðu gjøgnumgingin og samanborin við somu tøl fyri 2013. Greitt varð frá ymsum arbeiðum, sum vóru farin fram farna árið m.a. um tænastusáttmálar, arbeiðir uppá loft og veggir í tunlunum o.s.fr. Nøgdin av lekum lá millum 1.450-1.650 tons um samdøgrið. Um fíggingina varð nevnt m.a., at uml. 35 mió. kr. var forútgoldið uppá lánið. Miðalferðslan pr. dag í Norðoyatunlinum í 2014 var 2.310 akfør. Síðani varð greitt frá samlaðu ferðsluni og procentvísu broytingini, síðani tunnilin opnaði fram til ultimo 2014. Eisini varð greitt frá, hvussu prísirnir fyri at koyra gjøgnum tunnilin vóru lækkaðir gjøgnum árini.

   Eitt ávíst orðaskifti var um ferðsluna gjøgnum báðar tunlarnar generelt.

   Rakstrarætlanin fyri 2015 vísti eitt ársúrslit uppá 2,9 mió. og eitt likviditetsavlop uppá 3,7 mió. kr.

   Frágreiðingin varð síðani tikin til eftirtektar.

3. Jógvan Amonsson gjøgnumgekk roknskapin.

   Undir gjøgnumgongdini spurdi landsstýrismaðurin, um nevndin hevði gjørt sær nakra hugsan um, nær Norðoyatunnilin skuldi avhendast tí almenna. Formaðurin Jens Kári Vilhelm upplýsti, at ultimo 2015 var lánsskuldin komin niður á uml. 30 mió. Uml. 3½ ár aftaná tað skuldi lánsskuldin verið afturgoldin. Ein avhending kundi kanska farið fram í apríl 2020.

   Roknskapurin varð síðani góðkendur.

4. Ársavlopið varð flutt til næsta ár.

5. Nevndin varð afturvald.

6. Viðvíkjandi vali av grannskoðara upplýsti landsstýrismaðurin, at hann ynskti, at nevndin til næsta aðalfund fyrireikaði grannskoðarauppgávuna til útbjóðingar.

   Verandi grannskoðari P/f JANUAR, løggilt grannskoðanarvirki, varð afturvalt fyri komandi ár.

7. Innkomin uppskot og ymiskt.

   Eingin umrøða var.

Fundur lokin.

Sum fundarstjóri:

____________________________________

Óla Jákup Kristoffersen, adv.

Frúutrøð 4 · Postboks 6 · FO-110 Tórshavn · Telefon: (298) 35 33 35 · Telefax: (298) 35 33 36 · www.jura.fo · jura@jura.fo